# HALDIÐ SOSIALIN





TEKNA TEG SUM HALDARA **NÚ.**
**450 kr** UM ÁRSFJÓRÐINGIN
-SPARIÐ **395 kr** Í MUN TIL LEYSASØLU

950,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(650,- kr. fyri 1 ferð um vikuna · 5 bløð)

Sosialurin | ARGJAVEGUR 26 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

Sosialurin 341800

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr.: ____________

Undirskrift: ____________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn



KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag




Vika 31, 2005
www.kaupthing.fo

# Greenspan í brennideplinum

MARKNAÐARRÁK

Hósdagin í farnu viku vísti amerikanski handilsjavnin fyri desembur eitt hall á 56,4 mia. dollarar. Tað var eitt sindur minni enn væntað, men er tó tað næststørsta mánaðarliga hallið nakrantíð. Íleggjarar væntaðu, at hallið fór at minka í mun til novembur (59,3 mia.), og saman við ætlan forsetans um at minka gjaldsjavnahallið í helvt komandi 5 árini, hevði tað styrkt dollaran í fyrru helvt av vikuni úr 1,287 til 1,275 í mun til evruna. Tá hallið varð kunngjørt, fekk tað tó dollaran at vikna aftur til 1,286. Sostatt løgdu íleggjarar størri dent á, at hallið var sera stórt, heldur enn at tað var minkað í mun til novembur.

Sum heild kunngjørdi Ericsson ein vánaligan roknskap í farnu viku og lækkaði tí 8%. Roknskapirnir hjá Dell og Cisco vóru misjavnir. Tann hjá Dell var góður, men framtíðarmetingarnar vónbrutu nakað. Cisco kunngjørdi góðar inntøkur, men sølutølini vóru minni góð. Danske Bank hinvegin kunngjørdi ein sera góðan roknskap, sum tó í stóran mun var merktur av eingangsinntøkum frá m.a. frá sølu av fastogn. Týdningarmiklasti roknskapurin hesa vikuna kemur frá Hewlett-Packard. Tó metir Kautphing, at Alan Greenspan fer at hava størstu ávirkan á partabrævini hesa vikuna.

Hendan vikan verður væntandi hendingarík. Hópur av týdningarmiklum lyklatølum koma: Týskt BTÚ fyri 4. ársfjórðing og búskaparfrøðingaálit, BTÚ fyri 4. ársfjórðing úr ES, og úr USA koma smásøla, vinnuálit og framleiðsluprísvøkstur. Týdningarmesta hendingin hesa vikuna verður í USA mikudagin, tá tjóðbankastjórin Greenspan fer at halda halda sína hálvárligu røðu í senatinum, har hann fer at tosa um framtíðarútlit og peningapolitikk.

Marknaðirnir fara sum vant at sita undir hvørjum orði. Serligur áhugi er fyri, um hann enn einaferð fer at geva ábendingar um, at rentuhækkingarnar fara at halda áfram við 0,25%-stigum í senn, og hvat hann fer at siga um prísvøkstur. Nakrir tjóðbankalimir hava í seinastuni tosað um, at orðingin um áhaldandi smáar rentuhækkingar átti at verið strikað úr røðuni. Tað er tó ikki heilt greitt, um nevndarlimirnir meina, at renturnar skulu hækka meira enn 0,25%-stig, ella at tær áhaldandi rentuhækkingarnar skulu steðgast í eina tíð. Tí er tað eisini sera áhugavert, hvat hann fer at siga um prísvøksturin. Um hann metir prísvøksturin at vera nóg lágan, fer tað at halda lánsbrævarentunum niðri.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | → |
| 2 ára lánsbræv | 2,40% | -0,02% | ↓ |
| 5 ára lánsbræv | 2,90% | -0,05% | ↓ |
| 10 ára lánsbræv | 3,55% | -0,04% | ↓ |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 305,0 | 2,6% | ↑ |
| OMX, Svøríki | 766,8 | 1,5% | ↑ |
| Eurostoxx 50, Evropa | 3.080,1 | 1,4% | ↑ |
| S&P 500, USA | 1.205,3 | 0,2% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,36 | 0,2% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 173,58 | 0,5% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 89,53 | 1,7% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 61,62 | 2,0% | ↑ |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 5,79 | 0,0% | → |
| EUR | 7,44 | 0,0% | → |
| GBP | 10,81 | -0,4% | ↓ |
| NOK | 0,88 | -1,7% | ↓ |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*